

# Rentubroyting

**Sum avleiðing av seinastu rentubroytingini hjá danska Tjóðbankanum broytir Føroya Banki við gildi frá 10. september 2001 rentustigini á inn- og útláni.**

**Innlán**
Rentustigini á innláni lækka við 1/4 - 1/2 pst. Høvuðsrentustigini verða sum niðanfyri víst.

***Innlán við uppsøgn:***

| | | |
|---|---|---|
| Saldo | 0 - 100 tkr. | 3,50% |
| | 100 - 300 tkr. | 4,00% |
| | 300 - 1.000 tkr. | 4,25% |
| | 1.000 - tkr. | 4,50% |

| | |
|---|---|
| Nósakonto | 4,50% |
| Nýtslu-KontoIN | 3,00% |
| Uppsparingar-KontoIN | 4,50% |
| Bústaðarkonto (+ 3% í stuðli) | 3,50% |
| 60-ára konto / Ratukonto | 5,00% |

Longsta uppsagnartíðin á innláni, sum í dag er 12 mðr., verður broytt til 3 mðr.

**Útlán og kredittir**
Rentustigini á flestu útlánum - privatum sum vinnuligum - lækka við 1/4 - 1/2 pst. Rentan á 1. veðrættarlánum til bústað lækkar við 1/4 pst., og rentan á 2. veðrættarláni lækkar við 1/2 pst.

***Fyri bústaðarlán verður rentan henda:***

| | |
|---|---|
| 1. veðrættur | úr 5,75% |
| Onnur bústaðarlán | 8,25-9,25% |

***Rentan á billánum verður:***

| | |
|---|---|
| Billán - útgjald 40% | 6,50% |
| Billán - útgjald 25% | 7,50% |
| Brúktir bilar | 8,50% |

Nærri upplýsingar um nýggju rentustigini fáast frá kundaráðgevum bankans.

FØROYA BANKI

petur & petur • 320870



# Felagsskúlin á Oyrarbakka

Søkt verður eftir lærara til Felagsskúlan á Oyrarbakka hetta skúlaárið 10 tímar um vikuna við møguleika at fáa 12 vikutímar aftrat fyri lærara í farloyvi.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir skulu vera Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi míkudagin 12. september 2001.

**Skúlastýrið fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka**
v/ Hans Erland í Brekkunum, skr.
Tlf: 42 20 84 - Fax: 42 01 57



zarepta

# Frá Zarepta

Kvinnustevna verður í døgunum 21.09.-23.09.

**Evnið á stevnuni verður:**
Hevur Gud eina ætlan
í gerandislívi mínum.

**Tekning:**
**á telefon 315390 ella 283776**
**og fax nr. 333141.**



# Frá Kollafjarðar skúla

Tey, ið ætla sær at leiga fimleikarhøllina í vetur, verða biðin um at venda sær til Snarskivuna í Kollafirði tlf. 421120 mánadag kl. 9–12 ella hósdag kl. 14–18.

**Kollafjarðar skúli**



# Til sølu

| | |
|---|---|
| **Toyota Corolla 1,3,** | gráur, árg. 90. |
| **Toyota Corolla 1,6 GL,** | reyður, árg. 2000. |
| **BMW 323i,** | grønur, árg. 96. |
| **BMW M3,** | svartur, árg. 95. |

**Auto Tek**
**Tlf. 321206 og 253242**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2945, P/F Kaldbaks Seafood, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Kaj Leo Holm Johannesen, á Teigi 6, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Bjarki Mohr, Landavegur 72, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 4. september 2001

Kristin Balle


# ÚTBERARAR Í VÁGI



Søkt verður eftir fólki at bera bløð út í Vági

Áhugað ringið **tlf. 211201** millum kl. 9 og 17 ella sendið fax til 341201

**Prentmiðstøðin**
Smyrilsvegur 13 - Postboks 3019, 110 Tórshavn



# SKALT TÚ MÁLA?

Lat okkum mála fyri teg!



**Eyðun Jacobsen**
Málarameistari
Glyvrar
Tlf. 448355
Farttl. 226504

Sosialurin 311820



Restorffs ASSU



i

Sosialurin





**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Leiðsluskrivari

Starvið sum leiðsluskrivari á kirurgiska deplinum er leyst at søkja til setan 1. oktober 2001 ella eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- skrivari hjá leiðsluni í kirurgiska deplinum við tilvísing til leiðandi yvirlæknan og yvirsjúkrasystrina
- fíggjarstýring
- samskipari hjá leiðsluni v.v. starvsfólkafyrisiting og útbúgving
- fyrisitingarligt arbeiði so sum brævaskifti, journalisering v.m.
- bindiliðið millum sjúkrahúsleiðsluna og depilsleiðsluna

**Krøv til umsøkjaran:**
- skrivstovufólk við handilsskúlaprógvi
- ella læknaskrivari við góðkendari útbúgving og útbúgving innan skrivstovuyrkið
- evni til at raðfesta og planleggja arbeiðið
- góður edv-førleiki
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- førleiki í føroyskum og donskum bæði skrivliga og munnliga
- góð samstarvsevni og tænastuhug
- góður røkjuskapur

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt fjølbroytt starv
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Starvið er í løtuni flokkað í 20 lønarflokki.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ceciliu Vestureið, yvirsjúkrasystir á tlf. 31 35 40, lokal 129 (L), har biðjast eisini kann um eintak av starvslýsingini, ella til leiðandi yvirlæknan, Johan P. Davidsen, lokal 248 (L).

**Umsóknarfreistin er 24. september 2001 kl 12.00**

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn



**Starv**

# Virkissamskipari

Vegna tað, at viðkomandi, sum hevur røkt starvið sum virkissamskipari á stjóraskrivstovuni fer undir hægri útbúgving í útlandinum, fara Strandfaraskip Landsins (SL) við hesum at søkja eftir einum virkissamskipara at seta skjótast gjørligt.

Stjóraskrivstovan er ein stápsdeild undir stjóranum og skal sum høvuðsuppgávu verða leiðsluni til hjálpar.

Á SL er talan um eitt desentralt arbeiðsumhvørvi við nógvum eindum runt um í landinum. Hetta hevur m.a. við sær ein stóran tørv á samskipan innan tænastuna og umsitingina. Stjóraskrivstovan skal virka sum ein samskipandi funktión, har miðað verður ímóti at skapa felags karmar at virka undir tænastuliga og umsitingarliga.

SL hava knýtt eindirnar tættari saman við kunningartøkni og skapar hetta betri fortreytir fyri at tryggja eina góða samskipan.

**Stjóraskrivstovan**
Stjórin á SL hevur ovastu leiðsluna og umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av virksemi stovnsins.
Ábyrgdarøkið fevnir eisini um langtíðar ráðlegging við ábyrgd fyri samskipan av ymsu deildunum og virkisøkjunum.
Stjóraskrivstovan hevur ein týdningarmiklan leiklut at samskipa dagligu umsitingarligu uppgávurnar hjá leiðsluni. Harafturat skal deildin verða við í teirri menning og nýskipan, ið SL hevur fyri framman.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávurnar hjá samskiparanum eru:
- Avgreiða mál vegna stjóra ella leiðslu
- Stýra og umsita journal, hølisviðurskifti, kundamóttøku, postmóttøku og samskifti annars
- Verða við til at fyriskipa, samskipa og lata leiðsluupplýsingar av ymiskum slag
- Fyriskipa verkætlanir, eitt nú útbúgvingarætlan, journalskipan, marknaðarstrategi, virksemisroknskap oa.

Innihaldið í starvinum er nærri ásett í einari starvslýsing.

Virkissamskiparin fær ábyrgdina av at menna eina samskipandi funktión og arbeiða víðari við nøkrum avbjóðandi verkætlanum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving innan fyrisiting og handil, t.d. HA, HH ella tilsvarandi
- Helst royndir innan tænastu og fyrisiting
- Kunnleiki og royndir innan kunningartøkni/edv á brúkarastøði (td. teldukoyrikort).
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum
- Arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- Góð samskiftis- og samstarvsevni
- Álítandi og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 17. september 2001, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 343000 ella e-mail: ren@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS



# Vøruvognur til sølu

Nissan Serena Cargo 2,3 diesel. Árg. 01.03.96, 117.000 km, kr. 95.000,- v/ mvg.

**BBR-Service**
620 Runavík
Tlf. 449111 og 219011



# Til sølu

| | |
|---|---|
| **Toyota Corolla 1,3,** | gráur, árg. 90. |
| **Toyota Corolla 1,6 GL,** | reyður, árg. 2000. |
| **BMW 323i,** | grønur, árg. 96. |
| **BMW M3,** | svartur, árg. 95. |

**Auto Tek**
**Tlf. 321206 og 253242**



# Ford Mondeo til sølu

1.8i Trend+. Árg. 01.02.2001. Koyrt 12.000 km, útstýr: 16" sportfelgur, senkaður, tuningsbakpott, el-setur, varma í forrút, tokuljós o.a.

**Tlf. 224406 og 311013**